Alzheimersfelagið:

# Demenslinjan letur upp í dag



*Sigrún Mohr og Kári Árting í Alzheimersfelagnum leggja nú til brots við demenslinjuni*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Alzheimersfelagið, sum varð sett á stovn 9. september í ár, fer nú av álvara undir virksemið sítt. Í dag letur tann sokallaða demenslinjan upp, ið er ein telefonlinja, sum skal upplýsa og kunna um demens-sjúkurnar**

ALZHEIMERSFELAGIÐ
*Ingrid Bjarnastein*

Telefonlinjan er fyri øll, og fer hon at svara hvørt týskvøld frá klokkan 18 – 20.

– Tað er so nógv at fara í holt við á hesum økinum, og hava vit valt at byrja í smáum, sigur Sigrún Mohr, formaður í Alzheimersfelagnum.

– Hetta er so fyrsta veruliga stigið vit taka eftir at felagið varð sett á stovn. Við telefonirnar koma at sita fakfólk, ið hava upp til 20 ára royndir innan demens. Tey, ið ringja inn kunnu vera anonym, og hava tey, ið svara telefonunum tagnarskyldu.

At hava eina demenslinju er eisini roynt í londunum rundan um okkum, og verða tær linjurnar ógvuliga nógv brúktar. Hendan linjan verður í fyrsta lagi ein royndkoyring í tríggjar mánaðar. Eftir tað verður tikið støðu til um haldast skal fram ella ikki.

Øll kunnu ringja á demenslinjuna. Fólk, ið møguliga hava mistanka um demens, avvarðandi, sjúk ella eisini um ein hevur tørv á at tosa við onkran. Tað er jú ógvuliga tungt hjá teimum avvarðandi at hava ein dementan í familjuni, og kann hetta fara við nógvari orku.

### Alzheimers mest útbreitt

Talið á dementum í Føroyum liggur um 1000, og er hetta talið roknað út frá eini kanning, ið ein professari í universitetinum í Odense hevur gjørt á Fyn. Ongi føroysk hagtøl eru enn, men samanborið við onnur lond, man talið liggja harum.

Tað finnast upp til 100 demenssjúkur, harav er Alzheimers tann mest vanliga. Upp til 60% av demenssjúkunum er Alzheimers.

–Demens er ein fylgja av tí, sum hendir í heilanum. Heilasellurnar missa sambandið við hvørja aðra, og kann hetta koma av so nógvum, sum til dømis heilabløðing, sigur Kári Árting, limur í Alzheimersfelagnum.

– Sjúkan er arvalig, og verður granskað nógv innan júst hetta økið, tí hetta er jú ein samfelagstrupulleiki.

At fáa eina diagnosu er ógvuliga týdningarmikið hóast sjúkan ikki kann lekast. Heilivágur er, sum kann leingja sjúkragongdina munandi, soleiðis at tann sjúki fær betri liviumstøður í longri tíð.

Demens er staðfest heilt niður í 30 árs aldurin, men er hetta ikki vanligt. Eldri tú verður, størri er møguleikin fyri at verða dementur. Sagt verður, at 25% av fólkunum verða rakt av demens fyrr ella seinni.

Eisini hevur Alzheimersfelagið onnur ting á skránni, men tey fara ikki í gongd við hetta júst enn. Ætlanin er at fara út á bygdirnar við fyrilestrum, og eisini verður arbeitt við eini heimasíðu. – Men hetta fara vit ikki í gongd við fyrr enn fyrst í næsta ár, sigur Kári Árting at enda.

Demenslinjan letur upp í kvøld klokkan 18, og svarar hon til klokkan 20. Annars verður hon opin, hvørt týskvøld frá 18 – 20. Telefonnummarið er 313102.

# Úr skúlastovu út á sjúkrahús

STARVSVENJING
*Maria Kristina Smith, praktikantur*

Síðan 5. november 2001 hava Malan H. Hansen og Sunrid Mørkøre úr Skúlanum við Ósánna í Klaksvík, verið í starvsvenjing á Landssjúkrahúsinum. Malan og Sunrid, sum báðar ganga í 9.b, siga, at tær valdu sjúkrahúsið tí at tær vildu royna okkurt nýtt. Higartil hava tær arbeitt í goymsluni, vaskarínum og á deildini fyri fysioterapi, og hildu tær tað seinasta vera sera stuttligt og spennandi. Í síðstu viku skuldu tær í køkin, og tað var eisini ætlað at tær skuldu arbeiða saman við portørunum, men nú tá ið teir eru í verkfalli, var tað ivasamt um tað fór at koma burturúr tí.

Ein vanligur arbeiðsdagur hjá Maluni og Sunrid byrjar kl. 9 og endar kl.15. Teimum dámar væl fólkini á arbeiðstaðnum, og siga at øll eru sera fitt og blíð og hava tikið væl ímóti teimum. Spurdar um hetta er nakað sum tær kundu hugsa sær at fingist við í framtíðini, siga tær, at tað má tíðin vísa. Starvsvenjingartíðin hjá gentunum, endaði tann 16. november.



*Malan og Sunrid hava seinastu 14 dagarnar verið í starvsvenjing á Sjúkrahúsinum í Havn*



# Føroysku limirnir uttan ávirkan

**Føroysku fólkatingslimirnir verða ikki tungan á vágskáluni í Fólkatinginum hesuferð eins og seinast. Borgarligu flokkarnir fara at vinna so tryggan meiriluta, at tað er líka mikið, hvønn teir føroysku fólkatingslimirnir peika á sum komandi forsætisráðharra.**

FÓLKATINGSVAL
*Magnus Dam, Keypmannahavn*



*Anders Fogh Rasmussen fær væntandi 100 fólkatingslimir aftanfyri seg eftir valið í dag, og sostatt verður hann nýggjur forsætisráðharri.í Danmark.*

Við umleið 100 fólkatingslimum aftanfyri seg, fer Anders Fogh Rasmussen at sita tryggur í sessinum sum danskur forsætisráðharri eftir fólkatingsvalið í dag.

Enn eru atkvøðuhølini ikki latin upp, men alt bendir á, at borgarligu flokkarnir vinna stórsigur. Allar veljarakanningar geva Anders Fogh Rasmussen valsigurin, eins og tær hava gjørt seinastu vikurnar. Tað hevur ikki eydnast og fer neyvan at eydnast Poul Nyrup Rasmussen at venda gongdini eins og hann gjørdi í 1998.

Vinstri-flokkurin hjá Anders Fogh Rasmussen verður helst størsti flokkur á Fólkatingi eftir valið. Hann fær sambært veljarakanningunum 58 fólkatingssessir, meðan Socialdemokratiski flokkurin fær 52 sessir, 11 færri enn á seinasta vali.

### CD er úti

Álitið hjá Anders Fogh Rasmussen verður konservativi flokkurin, sum stendur til at fáa 16 sessir, sum er tað sama sum við seinasta val. Og flokkurin, sum tryggjar Anders Fogh meirilutan er Danski Fólkaflokkurin við Piu Kjærsgaard, sum sambært kanningunum fær 19 sessir og sostatt eina framgongd uppá seks sessir.

Hinir báðir flokkarnir, sum siga seg vilja stuðla einari borgarligari stjórn eru CD og Kristiligi Fólkaflokkurin. Veljarakanningarnar geva ikki CD afturval, meðan Kristiligi Fólkaflokkurin fær fimm sessir.

Socialistiski fólkaflokkurin varðveitir sínar 13 sessir, og Eindarlistin, sum eisini hevur styðjað Poul Nyrup Rasmussen, sleppur akkurát inn um gáttina við fýra fólkatingslimum. Teir Radikalu, sum sita í stjórnini saman við Nyrup vinna ein sess og fáa átta tilsamans.

Hinvegin sleppur ein gamal kenningur úr sjeytiárunum ikki inn aftur í Fólkatingið, og tað er Mogens Glistrup úr Framburðsflokkinum. Hansara flokkur fær ikki umboðan.

### Føroyar og Grønland broyta einki

Teir fýra limirnir úr Føroyum og Grønlandi fáa ikki ávirkan á stjórnarsamansetingina hesuferð. Sjálvt um teir allir fýra peikað á Nyrup eftir valið, so broytir hetta ikki myndina, um vit skulu trúgva veljarakanningunum.

Veljarakanningarnar eru broyttar lítið gjøgnum valstríðið, og tí skal okkurt heilt óvæntað henda, um næsti forsætisráðharrin ikki fer at eita Anders Fogh Rasmussen. Enn er ein hópur av veljarum, sum ikki hevur tikið støðu, men eygleiðarar rokna ikki við, at hetta fer at broyta endaligu myndina stórvegis.


Føroya Tele í Suðuroy søkir eftir fólki

"Tað er góðskan av tínum arbeiði, sum vil gleða Guð – ikki nøgdin"

Mahatma Gandhi



Til okkara deild í Suðuroynni verður søkt eftir fólki at byrja skjótast til ber.
Á Føroya Tele í Suðuroy starvast falt 9 fólk. Nýggja fólkið skal saman við øðrum starvsfólkum á deildini vera við í menningini av niðanfyristandandi uppgávum.

· Skráseting av kaðalneti
· Telefon og kunda avgreiðslu
· Vøru og goymslustýring
· Telebúðar avgreiðsla
· Aðrar uppgávur eftir tørvi.

Vit kunnu bjóða eitt áhugavert starv í mennandi og avbjóðandi umhvørvi, við góðum arbeiðsumstøðum

**Útbúgving og førleikar hjá umsøkjarum:**
Tekniskur assistentur ella líknandi viðkomandi útbúgving.
Tað er ein fyrimunur, at tú í stóran mun kanst arbeiða sjálvstøðugt, er opin og dugir væl at samstarva og tosa við viðskiftafólk og hevur royndir við EDV á brúkarastøði.

Arbeiðsstaður er Føroya Tele á Tvøroyri.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Føroya Tele og Starvsmannafelagið.

Gjølla upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fróða Mortensen, økisleiðara tel. 371000 ella starvsfólkadeildina tel. 303030.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 23. november 2001

**Umsóknir skulu sendast til**
Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!